Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Samgongan vil sjálv…

## *Oddagrein*

LØGTINGSINS fíggjarnevnd viðger í løtuni uppskotið, sum Kristian Magnussen løgtingsmaður legði fyri tingið um at hækka játtanina til bjálvingarstuðul til pensjónistar.

Á fíggjarlógini í ár er ein hálv millión sett av til bjálvingarstuðul. Í viðmerkingunum til fíggjarlógina sigur landsstýrið, at »játtanin er lækkað við 1 mió við teirri grundgeving, at tørvurin at fáa stuðul til bjálving ikki er tann sami, sum tá skipanin varð sett í gongd«.

KORTINI hevur tað víst seg ikki at vera so, og liggur Húsalánsgrunnurin í løtuni inni við umleið 110 umsóknum, ið hann ikki fær viðgjørt orsakað tørvandi játtan. Harumframt metir Húsalánsgrunnurin, at tað fara at komva umleið 40 – 50 umsóknir afturat í ár.

ALT hetta vita okkara politikarar - og hetta visti Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum, eisini. Og hon hevur arbeitt við málinum, segði hon í tinginum nú í vikuni, tá málið var til fyrstu viðgerð. Hon segði, at tað verður bøtt um hesi viðurskifti.

TAÐ er sera gott, at landsstýrið av sínum eintingum arbeiðir við málum, sum andstøðan reisir í tinginum. Bert spell, at andstøðuumboðini ikki vita av tí, so tey sleppa frá at gera tað arbeiðið, sum landsstýrið longu hevur gjørt…

MEN so einfaldur er veruleikin kortini ikki. Vit taka eitt dømi, sum vit her í blaðnum gjølla viðgjørdu í fjør: Málið um at javnseta tey tímaløntu við tey fastløntu - ella »uppskotið til løgtingslóg um broyting í lóg fyri Føroyar um dagpening vegna sjúku og barnsburð«.

TAÐ vóru andstøðuflokkarnir, Miðflokkurin, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin, sum løgdu uppskotið fram, eftir at samgongan hevði tikið burt karensdagarnar hjá teimum fastløntu. Andstøðuflokkarnir hildu, at tað mest rættvísa var, at tey tímaløntu eisini sluppu av við karensdagarnar.

TAÐ hildu summi samgongufólk eisini - men ikki øll. Helena Dam á Neystabø hevði sett ein arbeiðsbólk at arbeiða við málinum, sum landsstýrið skjótt fór at loysa.

EITT ár er nú liðið - og mismunurin millum fastlønt og tímalønt, sum samgongan skapti á vári 1999, stendur við.

NIÐURSTØÐAN er, at andstøðuuppskot skulu fellast, tí samgongan vil sjálv.

MEN vil hon?

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Politiska gonguvitið

Eftir at føroyingar vóru kunnaðir og partvíst heilavaskaðir um Hvítu- Caragata og hvørt av sínum, sum propagandaleiðarin, Hoydal nú einaferð kann finna uppá, legði Sambandsflokkurin uppskot fyri løgtingið, um at halda eina fólkaatkvøðu, áðrenn samráðingarnar við donsku stjórnina um fullveldisætlanina byrjaðu.

Við hesum vildi flokkurin tryggja sær og føroya fólki, at samráðingarnar vóru í tráð við føroyska fólkaviljan.

Tá atkvøtt varð fyri nú skjótt einum ári síðani, var tað bara Sambandsflokk-urin, sum atkvøddi fyri uppskotinum. Hin parturin av andstøðuni gav við sínum blonku atkøvðum fullveldisætlanini eitt herðaklapp við tí undanførðslu, at samgongan hevði sín demokratiska rætt, at samráðast við danir um Hoydalsdoktrinina.

**Alternativið**
Eftir at samráðingarnar, landsstýrið hevður havt við donsku stjórnina gjørdust ein landaskomm, umhugsar Miðflokkurin at leggja uppskot um eina fólkaatkvøðu um fullveldisætlanina fyri løgtingið, - um enn í seinna lagi.

Vit í Sambandsflokkinum bíða í spenningi, og eru ivasamir, um uppskotið í heila tiki kemur fyri løgtingið.

Hinvegin gjørdu Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin eitt felags samráðingarupplegg um eina framtíðarætlan viðvíkjandi ríkisrættarligu støðu Føroya, - sum ein breiður meiriluti av Føroya fólki tekur undir við.

Undirritaði skal tí staðiliga heita á Føroya løgting, um at taka uppleggið frá báðum teim størstu andstøðuflokkunum í álvara. - Tað hevði tænt føroya fólki, og verið Føroya landi til størsta sóma.

**Flemming Mikkelsen**

✝

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**TÓRUR ZACHARIASEN**
**Tórshavn**
vanliga nevndur Tórur í Hesti

andaðist í heiminum 25. aug., 88 ára gamal. Kistan fer úr heiminum sunnudagin 27. aug. kl. 16. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mánadagin 28. aug. kl. 14.

*Fyri tey avvarðandi*
**Esther, Karin, Jónatan, Eyðun og Fríða**

✝

**ÁSLEYG WINTHER JACOBSEN**
**Klaksvík**

andaðist mikukvøldið, 90 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum heim í Christianskirkjuna leygarkvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður sunnudagin kl. 13.30.

**Elin Súsanna, Ingun og Randi**



# Tøkk

Vit takka fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri maður, pápi, sonur, beiggi, ommusonur, versonur og svágur

**HERI MELLEMGAARD**
**Sønderborg**
**ættaður úr Klaksvík**

brádliga varð tikin frá okkum dýra biðidag.

Tøkk til Kristian Martin Rasmussen, Eyðun Elttør og Torleif Johannesen fyri troystandi orð og til tykkum øll, sum vóru komin saman til minningarhaldið, tá ið M/S Norðborg legði at bryggju. Tøkk til Poul Færø fyri troystarrík orð, bæði í heiminum og við minningarløtuna í Kristent Center, Sønderborg.

Tøkk til tykkum, sum troystaðu, ringdu okkum upp, komu inn á gólvið, fyri forbønir, heilsanir, blómur og øllum tykkum, ið hjálptu til á ymiskan hátt. Tøkk til manningina á M/S Norðborg, Norðoya Vanlukkugrunn, Kl. Arbeiðsmannafelag, Norðoya Sparikassa og øll tykkum, sum hava latið eina peningagávu.

Fyri tey avvarðandi
**Marjun, Mike og Chanet**

*Eg veit ikki tíð ella tíma,*
*Nær Harrin vil tala til mín,*
*Ei, um Hann á nátt ella degi,*
*vil taka sítt barn heim til sín.*

*Eg veit ei, hvat hann hevur til mín,*
*Hvør dýrd verður Jesusi hjá,*
*Ei, nær eg har heima skal lenda,*
*Hans fullkomna kærleika ná.*

*Kann henda, á sólheitum degi*
*Hann tekur meg arbeiðnum frá;*
*Kann henda, hans elskaða rødd meg*
*Á midnáttarstund kallar á.*

*Eg veit ikki – á, men eg bíði,*
*Ei ljós mítt má missa sítt skin,*
*Um eg so skal hoyra á morgni,*
*Á nátt ella degi mín vin!*

*Men eg veit, honum líkur eg verði,*
*Mær leingist, á, var tað í dag!*
*Eg veit, tá skal Lambið eg skoða,*
*Sum ofraði seg í mín stað.*

Fanny Crosby (Amer.), 1820-1915
(Sigurd Berghamar týddi)



# Stásiligur bygningur



*Á myndini síggjast teir tríggir, Bjarti Mohr, Hans Jóhannus á Brúgv og Marner Jacobsen, sum allir hava verið stjórar í bygninginum Yviri við Strond*

**Seinnapartin hósdagin beyð Føroya Sparikassi til móttøku í samband við, at stovnurin alment tók bygningin Yviri við Strond í nýtslu. Eisini hevði Føroya Sparikassi føðingardag - hann varð stovnaður 24. august í 1832, so hann hevði 168 ára føðingardag**

ORÐ OG MYNDIR
JONHARD HAMMER

Tað var ein vælnøgdur stjóri, sum kundi bjóða stóru mannafjøldini vælkomna í henda nýggja stásiliga bygningin. Eitt, sum tú legði til merkis var, at fólk vóru úr øllum landinum.

Lagið var sera gott, og onkrir gamlir kenningar hjá bygninginum vóru sera hugtiknir av stóru broytingini - gamla Fiskasølubygninginum hevði verið fyri. Onkur teirra hevði á orði, at honum longdist omanaftur, nú útsýnið er vorðið so sera gott. Hann helt fyri, at nú bar betur til at fygja vit tí, ið hendir á firðinum, og síggja vøkru Nólsoynna.

— Føroya Sparikassi keypti bygningin frá Føroya Fiskasølu í 1996. Og í 1998 vóru arbeiðini boðin út. Arbeiðið upp á bygningin hevur gingið sera væl, og vit eru sera væl nøgdir við avrikið, segði Marner Jacobsen, stjóri.

Bygningur kostar sum hann stendur — íroknað keypið og við innbúgvi og installatiónum 53 milliónir. Henda prísin eru vit nøgdir við, sigur Marner Jacobsen. Tað hevði verið nógv dýrari at bygt ein nýggjan bygning. Hann heldur eisini, at bygningurin liggur sera væl fyri yviri við Strond.

# Landsstýrið fullmannað mánadagin

Mánadagin verður landsstýrið aftur fullmannað, tí tá tilnevnir Anfinn Kallsberg, løgmaður, Bjarna Djurholm til landsstýrismann í vinnumálum. Í hesum sambandi verður móttøka í móttøkuhølum løgmans í Tinganesi mánadagin 28. august klokkan 15.00

# Vøkstur í rakstribankans

EIRIKUR LINDENSKOV

Fyrra hálvár í ár hevur Føroya Banki eitt yvirskot upp á 85 milliónir krónur áðrenn skatt. Hetta er heldur slakari, enn tær 115 milliónirnar, sum bankin hevði í yvirskoti fyrra hálvár í fjør. Hetta er greitt, nú nevndin í Føroya Banka hevur góðkent hálvársroknskap bankans fyri 2000.

Føroya Banki hevur eitt úrslit av vanliga rakstrinum upp á 133,1 millión krónur móti 117,7 milliónir krónur sama tíðarskeið í fjør. Hetta er ein vøkstur upp á 13.1%, sum serliga er orsakað av enum hækkaðum rentustøði á peninga- og viðrirsbrævamarknaðunum. Samstundis eru rakstrarútreiðslur bankans falnar við sjey prosentum í mun til undanfarna ár - úr 60,5 milliónum krónum fyri 1999 í 56,2 milliónur krónur fyri 2000, sigur Jørn Astrup Hansen, forstjóri í Føroya Banka.

Úrslitið av vanliga rakstri bankans er soleiðis 76,9 milliónur krónur ímóti 57,2 milliónur krónur fyrra hálvár í fjør. Hetta er ein vøkstur upp á 19,7 milliónur ella 34,4%, sigur hann.

Orsakað av at gjaldføri bankans eins og undanfarin ár hevur verið stórt, hevur verið neyðugt at seta stóran part av hesum í ognir á peninga- og virðisbrævamarknaðunum. Gongdin á hesum marknaðum hevur havt við sær, at bankin hevur virðisjavnað hesar ognir við - 15,6 milliónum krónum í hálvársroknskapinum fyri 2000, sum sjálvandi síggjast aftur í úrslitinum fyri hálvárið.

Eins og undanfarin ár er úrslitið merkt av afturførdum burturleggingum ímóti tapi upp á skuldarar bankans. Henda ávirkan er tó ikki eins stór og seinastu árini, tí inntøkuførdar eru 27,3 milliónir krónur fyrra hálvár 2000 ímóti 62,4 milliónum krónum sama tíðarskeið í 1999.

Innlán bankans fevndu tann 30. juni 2000 um 3,5 milliardir krónur móti 3,3 milliardum krónum við hálvárslok undanfarna ár. Í sama tíðarskeiði eru bókaðu útlán bankans vaksin úr 2,5 milliardum krónum í 2,8 milliardir krónur.

Samlaðu ognir bankans fevndu við hálvárslok 2000 um 4,8 miliardir krónur ímóti 4,5 milliardir krónur undanfarna ár.

Eginogn bankans fevndi við hálvárslok um 1.079 milliónur krónur umframt óskattaða úrslitið upp á 84,9 milliónur krónur, sigur Jørn Astrup Hansen í fráboðan til fjølmiðlarnar.

# Bergljót Ihlen verður rektari



*Bergliot Ihlen er sett sum nýggjur rektari við Sjúkrasystraskúla Føroya. Hon hevur starvast innan heilsuverkið síðani 1969 Mynd: Jonhard Hammer*

Bergliot Ihlen verður nýggjur rektari á Sjúkrasystraskúla Føroya Hesum boðaði Undirvísingar- og mentamálastýrið frá í gjár.

Bergliot Ihlen tók prógv sum sjúkrasystir í 1969. Herumframt hevur hon eisini tikið prógv í Medicinskari Antropologi. Bergliot hevur starvast innan sjúkrahúsverkið í góð 30 ár.

Síðani 1977 hevur Bergliot Ihlen starvast sum varafyristøðukvinna og í fýra ár sum fyristøðukvinna á Landssjúkrahúsinum. Harumframt hevur Bergliot Ihlen verið lærari á Sjúkrasystraskúlanum í fýra ár.

Tað síðsta árið hevur Bergliot Ihlen verið í starvi sum útbúgvingar- og menningarleiðari í Almanna- og Heilsumálastýrinum.



Til landsdyst í Zürich

**Sveis - Føroyar**

**Beinleiðis úr Vágum**

**Stuðlið landsliðnum og njótið harafturat 9 dagar í bergtakandi landinum, frá 4. til 12. okt.**

**Fráferð:** Beinleiðis úr Vágum til Zürich tann 4/10 kl. 17.30
**Heimaftur:** Beinleiðis úr Zürich í Vágar tann 12/10 kl. 21.45

**Gisting:** Gist verður í 9 dagar/8 nætur í Sveis, møguleiki er at velja ímillum 2 trístjørnað hotell mitt í gamla býnum.

**Útferðir:** Skipað verður eisini fyri útferðum (ikki íroknað prísin)

Kostnaður:

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Hotel Scheuble** | fyri hvønn á einkultkamari | kr. | **9.550,-** |
| **Hotel Scheuble** | fyri hvønn á dupultkamari | kr. | **7.735,-** |
| **Hotel Adler** | fyri hvønn á einkultkamari | kr. | **8.590,-** |
| **Hotel Adler** | fyri hvønn á dupultkamari | kr. | **7.100,-** |

**Íroknað prísin er:** Flogferð, gisting við morgunmati, bussflutningur frá flogvølli til hotell og aftur, bussflutningur frá hotell til stadion og aftur, atgongumerki til dystin og ferðaavgjøld.

Seinasta freist at tekna seg er 4/9-2000

Atlantic Airways
tel 333 900 • fax 333380

SANSIR